Búskapur og vinna:

## Vilha ikki hava útlendskan kapital

Hóast danska fiskivinnan sigur seg væl fyrireikaða til tær ætlaðu broytingarnar í ES-fiskivinnupolitikkinum, ávarar fiskimálaráðharrin, Marianne Fischer Boel, um, at donsku fiskimenninir mugu fyrireika seg til uppaftur fleiri broytingar.

Eitt er, at nøkur donsk fiskifør skulu høggjast upp afturat, men tann skerdi stuðulin frá ES fer at seta vinnuni munandi størri krøv til kapital, og tað eru teir, sum vænta, at hetta kann fara at bera í sær, at útlendskur kapitalur fer at koma inn í donsku fiskivinnuna. Danska fiskimannafelagið hevur longu gjørt vart við, at tað heldur tað vera sera óheppið, um einstaklingar ella fyritøkur í útlondum skulu eiga partar av danska fiskiflotanum.

## ILA breiðir seg

Norsku myndugleikarnir hava staðfest , at sjúkan ILA hevur rakt eina alistøð afturat í Troms. Felagið Nordreisa Laks eigur alistøðina, og sjúkan varð staðfest í laksi, sum varð tikin í síðstu viku.

Hetta er fyrstu ferð í hálvt annað ár, at ILA er staðfest í Troms, og myndugleikarnir hava givið alistøðini boð um at taka allan laksin. Tað er ikki greitt, hvussu smittan kom til Nordreisa Laks.

## Minni kvotu

Altjóða fiskifrøðingar hava á einari ráðstevnu í Bergen mælt til, at toskakvotan fram við norsku strondini verður skerd munandi. Tilmælið hjá fiskifrøðingunum er at skerja kvotuna heili 80 prosent næsta ár.

Toskaveiðan í Barentshavinum eigur eisini at verða skerd. Norðmenn og russar hava sett kvotuna næsta ár til 395.000 tons, men fiskifrøðingarnir siga, at hon eigur ikki at verða størri enn 305.000 tons.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Hann legði 11. september til rættis



*Amerikanarar eru sannførdir um, at tað var hesin maðurin, Khalid Shaikh Mohammed, sum legði atsóknina tann 11. september í fjør til rættis*

**Amerikansku myndugleikarnir siga seg vera vísar í, at tað var Khalid Shaikh Mohammed, sum legði yvirgangsatsóknina tann 11. september í fjør til rættis**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Amerikansku myndugleikarnir siga seg nú vera sannførdar um, at al-Qaeda-leiðarin Khalid Shaikh Mohammed var maðurin, sum legði yvirgangsatsóknirnar at World Trade Center og Pentagon tann 11. september í fjør til rættis.

Shaikh Mohammed er ættaður úr Kuwait, men amerikanarar halda, at hann er í Afghanistan ella í Pakistan. Amerikanskir embætismenn siga, at hann er ein av teimum fimm ovastu leiðarunum í felagsskapinum al-Qaeda hjá Osama bin Laden.

Í 1996 varð Khalid Sheikh Mohammed lagdur undir at hava lagt eina ætlan um at leggja eina bumbu í eitt amerikanskt ferðamannaflogfar, og eftir ætlanini skuldi bumban bresta, tá flogfarið var yvir Kyrrahavinum.

Amerikansku myndugleikarnir hava boðið sær til at rinda 25 milliónir dollarar fyri upplýsingar, sum kunnu bera í sær, at Shaikh Mohammed verður tikin, men higartil hevur eingin latið við seg koma.

Sambært amerikansku myndugleikunum eru Khalid Shaikh Mohammed og ein annar kendur yvirgangsmaður, Ramzi Ahmed Yousef, skyldmenn. Hildið verður, at tað var Ahmed Yousef, sum skipaði fyri bumbuspreingingini í World Trade Center í 1993, tá seks fólk doyðu. Yousef varð seinni tikin og dømdur lívlanga fongsulsrevsing, og hann situr í einum fongsli í statinum Colorado.

# Ógvuslig bumbuspreinging í Ísrael

**Ísraelska stjórnin gevur palestinsku myndugleikunum skyldina av blóðugu bumbuatsóknini í býnum Megiddo í gjár**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*

Ein bilbumba, sum brast í ísraelska býnum Megiddo tíðliga gjáramnorgunin, drap 17 ísraelsmenn, og umleið 40 fólk fingu skaða.

Ísraelska løgreglan segði, at ein palestinskur sjálvmorðsbumbumaður koyrdi bilin við bumbuni. Sambært løgregluni koyrdi bilurin upp á síðuna av einum bussi, áðrenn bumban brast. Spreingingin var so hørð, at bussurin varð fullkomiliga oyðilagdur. Nógv fólk, sum vóru á veg til arbeiðis, vóru í bussinum. Sambært ísraelsku løgregluni plaga nógvir ísraelskir hermenn at ferðast við hesari bussleiðini, tá teir fara úr Tel Aviv til herstøðirnar.

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, boðsendi alt fyri eitt teirri serligu trygdarnevndini hjá stjórnini, og ein talsmaður hjá Sharon segði, at teir palestinsku sjálvsstýrismyndugleikarnir noyðast at átaka sær ábyrgdina av tilburðinum. Talsmaðurein legði afturat, at atsóknin er enn eitt tekin um, at palestinsku myndugleikarnir við Yasser Arafat á odda leggja als ikki í at steðga yvirganginum.

Men palestinsku myndugleikarnir vístu hesum aftur. Ein talsmaður hjá Arafat segði, at myndugleikarnir vóru í ferð við at savna upplýsingar um tilburðin í Megiddo, og hann segði seg harmast tað, sum hent var.

Bumbuatsóknin í Megiddo er tann blóðugasta í fleiri vikur, og hetta hendir, júst sum amerikanski fregnartænastustjórin, George Tenet, roynir at fáa ísraelsmenn og palestinar til samráðingarborðið. Eygleiðarar í Miðeystri siga, at tilburðurin er uttan iva eitt álvarssamt afturstig fyri royndina at fáa frið í lag.

Úr Norðurlondum:

## 1000 skjøl afturat

Í morgin fer danska kommunan Farum at lata fjølmiðlum umleið 1000 skjøl afturat, sum lýsa, hvussu fyrrverandi borgarstjórin, Peter Brixtofte, stýrdi kommununi. Tí er einki at ivast í, at donsku blaðlesararnir fáa ovmikið av spennandi søgum úr Farum um vikuskiftið.

Tað eru tó ikki bara fjølmiðlarnir, sum hava biðið um innlit í skjøl hjá kommununi. Nógvir borgarar í kommuni hava gjørt tað sama, og umsitingin hjá kommununi sigur, at nógv skjøl verða almannakunngjørd afturat. Higartil hevur Farum kommuna latið umleið 2000 skjøl frá sær, men umsitingarleiðarin í kommununi sigur, at skulu øll roknskaparskjølini útflýggjast, snýr tað seg um millum 30.000 og 40.000 skjøl.

## Í verkfalli

Norsku blaðlesararnir eru illa fyri í hesum døgum, tí meiri enn 3300 blaðfólk hava nú verið í verkfalli í meiri enn eina viku. Týskvøldið varð roynt at loysa trætuna millum blaðfólkini og blaðútgevararnar, men uttan úrslit.

Blaðfólkini krevja at fáa eina fríviku afturat, men higartil hava útgevararnir ikki viljað latið teimum meiri enn tríggjar frídagar afturat, sum er tað sama, sum prentararnir hava fingið. Ongar nýggjar semingsroyndir eru avtalaðar.

Verkfallið hjá blaðfólkunum ber í sær, at flestu norsku bløðini koma ikki út, men okkurt blað hevur tó tíðindi á alnótini.

## Funnin bakbundin og deyður

Ein 57 ára gamal maður varð týskvøldið funnin deyður í keypssamtøkuhandlinum í býnum Egtved nærhendis Vejle. Maðurin lá bakbundin og hevði klistriband um munnin, og sambært løgregluni var hann kvaldur. Maðurin arbeiddi í handlinum.

Løgreglan í Vejle sigur, at maðurin er deyður stutt eftir klokkan sjey týskvøldið, men enn hevur løgreglan eingi spor at ganga eftir í málinum.



# Eimskip byggir skrivstovu og vørugoymslu á Skansabryggjuni

**Starvsfólkini hjá Eimskip seta spakan í á Skansabryggjuni hósdagin 6. juni**

Sum fyrsta flutningsfyritøka í landinum, fer Eimskip nú undir at byggja egna skrivstovu og vørugoymslu á havnarøkinum í Havn. Byggifelagið MT Højgaard stendur fyri byggingini, ið fer at seta dám á Saknsabryggjuna í Havn næstu mánaðirnar.

Hósdagin 6. juni seta starvsfólkini hjá Eimskip spakan í, og í hesum sambandi verður høvi eisini nýtt tilat undirskriva sáttmálar við byggifelagið MT Højgaard, Tórshavnar Býráð og Tórshavnar Havn.

Síðan verður farið í gongd at byggja. Nýggi bygningurin, ið verður samanlagt 1.500 fermetrar til støddar, verður lðugur at flyta inn í síðst í árinum, um alt gongur eftir ætlan.

Nýggja skrivstovan verður 300 fermetrar til støddar, og fer at skapa betri umstøður fyri tey 25 starvsfólkini, sum í dag starvast dagliga á skrivstovuni hjá Eimskip.

Talan er um ein framkomnan bygning við øllum teimum nýggjastu hentleikum innan goymsluøkið. Stórur dentur er lagdur á góðsku, soleiðis at Eimskip kann bjóða sínum viðskiftafólki eina nýmótans vøruhandfaring. Bingjurnar verða framyvir fyltar og tømdar inni í vørugoymsluni. Tær verða koyrdar heilt til dyrnar og tømdar gjøgnum serligar dyr fyri bingjur. Hetta hevur við sær, at vøran ongantíð kemur at standa úti í regni og vindi og verður lítið handfarin. Á henda hátt kann Eimskip tryggja bestu viðferð av vøruni.

Umframt vanliga vørugoymslu bjóðar Eimksip eisini viðskiftafólkunum at goyma vøru á eini frígoymslu. Har kann hon goymast ótollað, til hon verður tikin út eftir tørvi. Tað sparir kundanum gjaldføri, og kann hann senda vøru av landinum aftur ótollaða, um hann ikki fær brúk fyri henni.

Vøruhotel og -útkoyring er enn ein onnur tænasta, Eimskip fer at bjóða kundunum. Um kundin manglar goymslupláss í styttri ella longri tíðarskeið, kann hon liggja á goymslu hjá Eimskip.

Við hesum vil Eimskip bjóða viðskiftafólki sínum eina framkomna og trygga flutningstænastu á hædd við fremstu flutningstænastur í heiminum.




*Stjórin í Eimskip úti á økinum, har fyritøkan nú skal til at byggja út.*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Fakta**

| | |
|---|---|
| Stað: | Skansabryggjan |
| Stødd: | 1500 fermetrar |
| Longd: | 50 metrar |
| Breidd: | 30 metrar |
| Hægstapunkt: | 12,5 metrar |
| Skrivstovan: | 300 fermetrar |
| Vørugoymslan: | 1.200 fermetrar |
| Plattapláss: | 1.270 |
| Bygging byrjar: | Juni 2002 |
| Væntandi liðugt: | Endanum á 2002 |
| Byggifelag: | M. T. Højgaard |

# Stimbrar gransking, varðveiting og burðardygga umsiting

**Í døgunum, 29.-31. mai, varð sjeynda NAFMC-ráðstevnan hildin í St. Pætursburg millum fiskimálaráðharrarnar í Norðuratlantshavi. Stevnan varð hildin undir forsæti av formanninum í stjórnarnevndini fyri fiskiskapi í Russiska Samveldinum, E. Nazdratenko.**

SAMSTARV
*Vilmund Jacobsen*

Umframt E. Nazdratenko og ES-kommiserin í fiskivinnumálum, vóru fiskimálaráðharrarnir í Kanada, Grønlandi, Íslandi og Noregi við á NAFMC-ráðstevnuni. Føroyar vóru eisini við, og okkara umboð var Kaj P. Mortensen, fiskimálastjóri.

Ráðharrarnir avgjørdu at taka tvey evni upp á ráðstevnuni:

- At seta mál fyri samstarvi um havrannsóknir og nýtslu av nýggjari tøkni í fiskivinnuni í Norðuratlantshavi.
- At endurnýggja fiskivinnupolitikkin í Norðuratlantshavi, samskipa vistskipanir og tillaga umhvørvispolitikkin í umsitingini av fiskivinnuni.

Á stevnuni viðgjørdu ráðharrarnir ymisk nýggj tiltøk um skipanarligar ætlanir í teirra ávísu havøkjum. Teir løgdu dent á týdningin av at sameina vistskipanir, tillagging og umhvørvisatlit í orðingina og útinnanina av slíkum verkætlanum í Norðuratlantshavi.

– Kanada legði fram eitt nýtt tiltak at eftirkanna teirra verkætlan fyri fiskiskapi við serligum denti á meginregluni um varðveitslu, eins og á tørvin á at sýna varisligan og vistskipanar tillagingar atburð, sigur Fiskimálastýrið í einum torskildum tíðindaskrivi um ráðstevnuna.

Norski fiskimálaráðharrin greiddi frá einum uppskoti um at savna havfyrisitingina. Hann lýsti hetta sum eina nýggja ætlan um umsiting av havumhvørvinum.

ES-kommiserurin legði fram seinasta uppskotið samtykt av kommisiónini til tess at fáa javnvág millum veiðiorku og verandi tilfeingi, um at steðga óregluligari veiði, at innføra umhvørvishugsjónir og um samstarv millum veiðilið og umsiting.

Fiskimálastýrið sigur, at ráðharrarnir gjøgnumgingu fleiri spurningar um havrannsóknir og nýtslu av nýggjari tøkni, og teir viðgjørdu eisini avtaluna frá 1995 um ferðandi fiskastovnar. Somuleiðis vórðu aðrar altjóða avtalur um fiskivinnuna viðgjørdar.

– Ráðharrarnir samdust um týdningin av samstarvi fyri at náa felags málinum um burðardygga og hóskandi gagnnýtslu av fiskivinnuni í Norðuratlantshavi við atliti til náttúrligu framleiðsluna í vistskipanunum. Teir viðgjørdu eisini veðurlagsbroytingar. Hesi langtíðarmál kunnu verða rokkin við størri vísindaligari vitan um vistskipanir og nýtslu av nýggjari tøkni.

Russiska Samveldið førdi fram síni sjónarmið um at leggja størri dent á samstarv innan havrannsóknir.

– Vísandi til øktar ávaringar um dálkingarárin í fiskiskapi, kundu ráðharrarnir viðurkenna, at finnast má veiðitøkni við tí endamáli at minka um dálking. Hetta krevur menning av veiðitøkni, serstakliga um vernd av fiski og nýtslu av hesi tøkni. Ráðharrarnir vóru samdir um, at hesi evni mugu takast fram og metast um í samstarvi millum havrannsóknarstovur og teirra, sum framleiða veiðireiðskap.

Fiskimálastýrið sigur, at ráðharrarnir tosaðu eisini um tað russiska modellið sum grundarlag fyri menning av heildareftirlitinum við vistskipanini og øðrum virksemi í landnyrðingspartinum av Atlantshavinum, t.d. sigling, olju-og gassframleiðslu og øðrum dálkingarkeldum.

– Teir umrøddu møguleikan innan ICES GLOBEC-ætlanina at menna og seta í verk eina ætlan um at granska ávirkanina, sum veðurlagsbroytingar hava á vistskipaninar og týdningarmestu fiskastovnarnar í Norðuratlantshavi , og teir tosaðu eisini um eina ætlan um at kanna ávirkanina, sum súgdjór í havinum hava á fiskastovnarnar í Norðuratlantshavi.

Ráðharrarnir tóku eisini fram Reykjavík-yvirlýsingina um ábyrgdarfullan fiskiskap frá 2001 og Tórshavn-yvirlýsingina í 2001 um vernd av havinum og um burðardygga nýtslu av tilfeinginum í Norðuratlantshavi. Hesar yvirlýsingar leggja dent á tað vísindaliga grundarlagið at taka vistskipanarlig viðurskifti við í umsitingina av fiskivinnuni.

– Við hesum í huga endurtóku ráðharrarnir, at ymiskt virksemi á landi og sjógvi, ið einki hevur við fiskivinnuna at gera, hevur ávirkan á vistskipanina í havinum og hevur fylgjur fyri umsitingina.

Fiskimálastýrið sigur, at ráðharrarnir vóru samdir um, at samrøðurnar, teir hava havt á hesi sjeyndu NAFMC-ráðstevnuni, fara at stimbra gransking, varðveitslu og burðardygga umsiting av livandi tilfeinginum í havinum og tess vistskipanum.

Avgjørt varð í St. Pætursburg, at áttanda ráðstevnan í røðini millum fiskimálaráðharrarnar í Norðuratlantshavi verður í Kanada.

– Ráðstevnan í Kanada fer m.a. at snúgva seg um avleiðingar av at seta í verk altjóða sáttmálan um ferðandi fiskastovnar, sigur Fiskimálastýrið í tíðindaskrivinum.